# Sølan av motorsúkklum er eksploderað



**Sambært seinastu hagtølunum hjá Akstovuni, fyri fyrstu fimm mánaðirnar í ár, eru seldar 137 motorsúkklur í mun til tríggjar í fjør. Sølan av persónbilum vaksin við næstan 30 prosentum**

AKFØR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Akstovan sendir hvønn mánað út tíðindaskriv við hagtølum yvir skráseting av nýggjum akførum. Nú fingu vit so hagtølini fyri fimm teir fyrstu mánaðirnar í ár í mun til somu tíð í fjør.

Tølini vísa, at fyrstu fimm mánaðirnar í ár vóru seldar 137 motorsúkklur í mun til tríggjar í fjør. Bara í mai mánað vóru seldar 55 motorsúkklur. Men sølan av prutlum er næstan hálverað við 84 prutlum í mun til 164 í fjør.

Sølan av persónbilum er eisini vaksin nógv. Við 724 bilum í mun til 561 í fjør er hetta ein vøkstur upp á næstan 30 prosent. Sølan av hýruvognum er eisini vaksin við 17 í mun til bert tveir í fjør. 14 kampingvognar eru seldir í ár.

MC-Sølan:

# 50 motorsúkklur seldar




*Jógvan Kristoffersen (nr. 2 f..v, á motorsúkkluni) saman við Heina Guttesen, Anders Berg og Boga Berg frá MC-Søluni*

Árið í ár má metast sum søluligt innan sølu av motorsúkklum í Føroyum, tí ongantíð áður eru nærtil so nógvar motorsúkklur seldar upp á so stutta tíð.

Tann 1. juni hevði MC-Sølan hjá Anders Berg á Norðasta Horni selt 50 nýggjar motorsúkklur. Motorsúkklu nr. 50 keypti Jógvan Kristoffersen í Havn. Talan var um eina Suzuki SV 1000 við 120 hk.

Av teimum 50 motorsúkklunum vóru tær 35 Suzuki, meðan hinar 15 vóru Kawasaki.

Tað sum gjørdi allan munin var, at skrásetingargjaldið á nýggjárinum fór úr 125 prosentum niður í 50 prosent. Hetta hevur havt við sær, at tey flestu nú heldur keypa sær eina nýggja motorsúkklu í staðin fyri eina góða brúkta.

Sum tað sæst í hagtølunum hjá Akstovuni, eru 137 motorsúkklur seldar fimm teir fyrstu mánaðirnar í ár í mun til bert tríggjar í fjør.

Heimasíðan hjá MC-Søluni: www.mc-solan.fo

Berg Motors:

# Besti mánaði nakrantíð

Stóra framgongdin í søluni av Suzuki-bilunum í Føroyum heldur áfram. Mai mánaði í ár var ein tann besti hvat bilasøluni viðvíkur hjá Berg Motors nakrantíð. Tilsamans seldur teir 73 nýggjar bilar, harav 60 av teimum vóru Suzuki. Hetta gevur ein marknaðarpart upp á 25,7 prosent. Í fjør vóru seldir 304 nýggir Suzuki av tilsamans 1684 seldurm bilum. Berg Motors seldu tilsamans 419 bilar í 2005.




*Stóra framgongdin í søluni av Suzuki-bilunum í Føroyum heldur áfram*

Shetland Classic Motor Show:

# Elligomul akfør til Hetlands og til Føroyar




**Tilsamans 24 ellisakfør frá The Veteran Club of Great Britain komu til Hetlands 4. juni í samband við Shetland Classic Motor Show. Eisini vitja hetlendingar í Føroyum við ellisakførum í døgunum 7. til 12. juni**

CLASSIC MOTORSHOW
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í samband við Shetland Classic Motor Show komu 24 ellisakfør frá The Veteran Club of Great Britain til Hetlands sunnudagin 4. juni. Talan verður um áhugaverd ellisakfør, har tann elsti bilurin var yvir hundrað ára gamal. Tann elsti er frá 1900 og tann nýggjasti er frá 1928. Bilarnir vóru av ymiskum enskum, fronskum og týskum bilmerkjum. The Veteran Club of Great Britain er ein av elstu veteranbilklubbum í Onglandi.

Fyri tveimum árum síðan skipaði Føroya Ellisakfør fyri einum túri til Shetland Classic Motor Show, sum er eitt lutfalsliga stórt tiltak við nógvum áhugaverdum akførum. Á framsýningini vóru motorsúkklur, persónbilar og lastbilar av kendum gomlum merkjum. Akførini eru væl hildin og í upprunastandi.

Í døgunum 7. til 12. juni kemur eitt ferðalag úr Hetlandi til Føroya við nøkrum ellisakførum, bæði bilum og motorsúkklum. Ferðalagið skal eisini vitja áhugafelagið Føroya Ellisakfør.

· Umvæling av tryggingarskaðum og privat skaðum
· Vit umvæla øll bilmerki
· Klárgering til sýn
· Bremsur, útstoyt, stoytdoyvarar, rustarbeiði o.m.a.



Ring og fá eitt tilboð

Sp/f Plátuverkstaðið
Falkavegur · Tórshavn · Tel 321778 ella 221778
Teldupostur: plv@plv.fo